# Rangers er bretska vónin í UEFA CUP



Í fleiri vandamiklum støðum var Allan McGregor tað einasta, ið helt Rangers inni í dystinum í UEFA-Cup kappingini í gjárkvøldið. Hansara meistarligu bjargingar tóku broddin av Werder Bremen áloyparunum, ið annars ikki vóru smædnir við at royna seg. 35 skot móti málinum, móti teimum bert fýra hjá Rangers, tað sigur ikki heilt so lítið. Rangers eru sera takksamir fyri at McGregor leveraði ein slíkan meistarligan innsats. Í fyrra dystinum í Skotlandi megnaði Rangers at vinna sannførandi 2-0 sigur, men í gjárkvøldið mugu teir sigast at vera sera hepnir. Fleiri ferðir bjargaði McGregor teimum, og hóast teir taptu 1-0, so komu teir víðari til fjórðingsfinalurnar, takkað verið sigrinum í Skotlandi. Málið hjá týskunum skoraði brasiliumaðurin Diego, men tað var ov lítið, hjá Bremen, ið nú mugu út úr kappingini, hóast at teir niðurspældu Rangers. Ensku liðini í Champions League komu øll víðari til fjórðingsfinalurnar, men í UEFA-Cup stendur verri til. tvey ruku út mikukvøldið, og í gjárkvøldið ruku eisini Bolton, ið taptu 1-0 í Lissabon móti Sporting.

# Verður tað ÍF ella SÍ

**Talan verður um spennandi oddabrak, tá ÍF leygardagin tekur móti SÍ. Vinnarin verður eftir dystin kosin Føroyameistari í flogbólti anno 2008**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*



*SÍ hevur verið rættuliga flúgvandi í hesum kappingarárinum, tær hava bert tapt ein dyst, og tá mátti javnbrótari til, áðrenn tær ungu SÍ kvinnurnar vórðu koppaðar. Dystin taptu tær móti ÍF, og tað skuldi 9 eisini verða ÍF, ið koppaðu teimum í steypafinaluni. Men sum skilst úr Sørvági, eru tær sera uppsettar til at gera teimum báðum ósigrunum fyri skommum, og spæla ein rimmar dyst*

Bert tveir dystir verða spældir í flogbólti um vikuskiftið, og eru báðir í Meistaradeildini hjá kvinnum. Oddabrakið verður, sum sagt á Kambsdali, og á Tvøroyri skulu TB royna at enda kappingarárið við stoltleika, tá tær taka móti Mjølnirskvinnum.

Tað fer ikki at broyta um endaligu støðuna, líkimikið hvør vinnarin á Tvøroyri verður, men tað fer altíð at vera hugaligari at enda kappingarárið við einum sigri. Hetta er óivað tað einasta, ið kann motivera leikararnar á ársins seinasta dysti.

### Avgerðin fellur á Kambsdali

Eins og í fjør, tá ÍF vann meistaraheitið í ársins síðsta dysti, verður ein sokallað finala á síðsta kappingardegnum í flogbólti í ár.

SÍ, sum í løtuni eru framman fyri ÍF við einum stigi á stigatalvuni, hava sera góðan hug at vinna sær meistaraheitið í ár. Við tí skal tað sjálvandi ikki skiljast sum, at ÍF ikki ynskja at vinna. Men SÍ tapti steypafinaluna so skammuliga, og tær eru sera uppsettar í at gera skaðan góðan, við at fara sigrandi av Kambsdali aftur.

### Hóparnir fullmannaðir

Bæði hjá ÍF og hjá SÍ verður talan um fullmannaðar hópar, ið fara at dystast um gullið. Einasta lítla ivamálið er á SÍ, har Heidi Christiansen hevur drigist við smásnuddir í knænum. Men hon er tøk til dystin, og skuldi nøkur pína komið undir dystinum verður hon ivaleyst før fyri at bíta pínuna í seg og kempa saman við liðfeløgum sínum.

Hjá monnunum er kappingin longu liðug, og har gjørdist SÍ tann stóri vinnarin. SÍ vann eisini steypakappingina, og greipuvinnararnar hava við gleði og gleim fegnast í sigursrómi í eina viku.

Silvurkrúnurnar endaðu í Fuglafirði, og tað var avgjørt, tá Mjølnir vóru á vitjan á Kambsdali fyrrakvøldið. ÍF vann dystin og harvið silvur, meðan skerda Mjølnir liðið mátti taka til takkar við bronsumerkjunum.

## Vit vilja vísa at vit kunnu

Liðskiparin hjá SÍ, Karin Mikkelsen var sera vónbrotin aftaná ósigurin í steypafinaluni, og hon lovaði at hon fór at gera alt í síni makt til at vinna FM-heitið.

Síðan steypafinaluna hava tær eisini vunnið allar sínar dystir, og tað við lít. Tær hava skumpa alla mótstøðu til viks, uttan stórvegis hóvasták, og hava veruliga reist seg eftir óhepnu finaluna, tá onki eydnaðist.

Vit fingu orðið á liðforkvinnuna hjá SÍ, og spurdu hana um ymiskt viðvíkjandi oddabrakinum.

*Hvat vænta tit tykkum av dystinum?*

- Vit fara eftir sigrinum sjálvandi, og vit eru sera uppsettar at vísa, at undanfarnir dystir móti ÍF hava verið mistøk, og at vit eru førar at spæla væl betur.

*Hvat skal til fyri at vinna á ÍF?*

- Vit mugu sláa kalt vatn í blóðið, og útihýsa øllum tí negativa tankunum. Heldur skulu uppala tað positiva frá kappingarárinum, og draga fram tað besta av tí besta. So er bert eftir at vóna at tað fer at røkka.

*Hvussu er hópurin fyri?*

- Vit eru allar tøkar, og hóast Heidi Christiansen hevur drigist við ein knæskaða, verður hon tøk at kempa saman við liðfelögum sínum.

Kempa vit allar saman, og spæla ein góðan dyst, og innsatsurin er góður, so eri eg nøgd, sigur liðforkvinnan á unga SÍ liðnum, Karin Mikkelsen.

# Kanska mín seinasti dystur

Aldursforkvinnan á rutineraða ÍF liðnum, Katrin Olsen, fer ikki at nýta eins nógva tíð til flogbólt í næsta ár, sum hon hevur gjørt áður, og hon sigur seg ikki duga at siga við vissu, um hon fer at gevast heilt.

Vit fingu orðið á Katrina Olsen, um dystin um vikuskiftið.

*Eg hoyri á lagnum at karmarnar vera í hásæti til oddabrakið?*

- Ja karmarnar vera góðir, vit hava lánt serliga gólvmáttuna, ið vanliga verður nýtt til steypafinalurnar, og so vóna vit at nógvir áskoðarar koma at stuðla okkum.

*Eru tit spentar til dystin?*

Ja spenningurin er sera stóru millum leikararnar, og eg eri varin, tí undan steypafinaluni høvdu vit júst tapt 3-0 móti SÍ í landskappingini. Nú eru vit í teirru støðu, at vit vunnu stórt í steypafinaluni, og tær eru tær svongu og grammu. Eg vóni ikki at nøgdsemi er ov stórt, tí tað hevði verið deiligt at vunnið greipuna, fyri fyrstu ferð í søgu felagsins.

*Verður hetta tín seinasti dystur á hægsta støði?*

- Eg veit ikki. Eg havi ikki avgjørt nakað enn. Tó er avgjørt, at næsta ár fer ikki at vera nýtt eins nógv tíð til flogbóltin. Eg fari ongantíð heilt at gevast við ítróttini, men tað hevði verið ótrúliga deiligt, at enda á toppinum við einari greipu, sigur Katrin Olsen, ið hevur hárfríðkanarstovu heima við hús.